

*Mr Petur Mohr Reinert says that although the times are not good, the international fishing industry has not been hit as hard as other sectors of industry. Therefore, the Fish Expo Faroes 2009 exhibition, which will be held in Tórshavn over the next few days, is completely comparable to previously held exhibitions, possibly even larger and more diverse*

# Altjóða vinnulív á stevnu í Gundadali

**Í ár er stóra, afturvendandi fiskivinnustevnan flutt oman í Havnina fyri at gera hana til ein samansjóðaðan part av býarlívinum í høvuðsstaðnum og tað ger tað upp aftur lættari hjá viðskiftafólki og framsýnarum**



- Vit leggja stóran dent á at skapa so góðar karmar sum gjørligt, bæði fyri framsýnarar og fyri viðskiftafólkini.

Tað sigur Petur Mohr Reinert, sum er ein av fyrireikarunum av stóru fiskivinnuráðstevnuna, sum verður mikudagin, hósdagin og fríggjadagin.

Og ein aðaltáttur í at skapa so góðar karmar sum gjørligt, er at flyta stevnuna oman í Gundadal.

Áður hevur fiskivinnustevnan verið í Runavík og uppi á Hjalla, men í ár verður talan um eina nýggja stevnu, undir nýggjum umstøðum og við nýggjum fyrireikarum.

Heitið á stevnuni í ár er "Fish Expo Faroes 2009" og karmurin er tvey stór, samansett tjøld, sett upp á Niðara Vølli í Gundadali og tað er ikki meiri enn ein stuttur gongutúrur eftir sløttum úr sjálvum miðbýnum í Havn.

Umframt framsýningina í sjálvum tjøldunum, eru eisini framsýnarar á økinum uttanfyri við trollemmum, trukkum og øðrum stórum lutum.

Men tað verða eisini framsýningarbátar niðri í Vágsbotni, har eisini ymiskt forvitnisligt verður at síggja.

Niðri í Vágsbotni fer Bjargingarfelagið eisini at vísa fram og helst fara teir eisini at sigla onkran túrin á vágni at vísa, hvat báturin hjá teimum dugur til.

## Nær hjartanum í Havn

Og tó at fyrireikararnir eru nýggir, er stevnan at kenna aftur, tí leisturin er at kalla hin sami.

Men við at flyta stevnuna oman í Gundadal, er stevnan komin so nær hjartanum í høvuðsstaðnum, sum tað næstan ber til at sleppa við so stórum tiltaki.

Í Gundadali og har um vegir eru eisini nógvir og góðir møguleikar at seta bilin frá sær.

- Endamálið við at flyta stevnuna oman í Gundadal, er at taka hana oman í býin og at gera hana til ein part av býnum, sigur Petur Mohr Reinert.

Hann væntar, at tað fer at seta ein øðrvísi og hugaligari dám á stevnuna.

- Vit halda eisini, at hetta fer at gera tað nógv lættari hjá viðskiftafólki at koma á stevnu, tí hon er at kalla mitt í býnum og sostatt fer tað eisini at gera tað lættari hjá viðskiftafólki og framsýnarum at hittast.

Men ikki minst fer tað at gera stevnuna hugaligari hjá bæði framsýnarum og viðskiftafólki, tí í Gundadali eru teir tætt við matstovur, kaffistovur, handlar, stovnar, fyritøkur og aðrar hentleikar, sum Havnin hevur at bjóða.

Og akkurát tann parturin